


# Kirkjugarður

*á Svínaryggi*

**Óli Jacobsen**
*olijacobsen@post.olivant.fo*



Lavasøgan:

# Tveir brøður gingu burtur í Høvdasundi

**Lavaættin er ein kend og stór ætt í Havn. Tí er hon eisini væl umboðað í gamla kirkjugarði í Havn. Hesa ferð umrøða vit »Peter á Lava Olsen's familjugravstað«**

Peter var sonur Óla Peter Lavesen, f. 1801, doyptur í Havnar kirkju 3/2-1802. Hann var húskallur í Kunoy, har hann giftist 11/11 1824 við Onnu Mariu Thomasdatter, fødd á Skarði og doypt 19/6 1801. Hon doyði í 1844.

Óli var útróðrar- og traðarmaður burturav. Sambært Karl á Tórgarði skal hann hava verið ein av teimum, sum áðrenn 1863 løgdu traðir inn av Húsagarðsfestinum. Hesar komu at liggja innanfyri Stóragarð. Seinni sæst abbasonurin Óli Lava Olsen at hava yvirtikið hesa trønna sambært matrikuleringina frá 1925/26.



*Hans hjá Per Lava*

Børnini hjá Óla Peter og Anna Maria kunnu kanska sigast at vera tey sum mynda Lavaættina í dag. Tað sigst at Lavafólkini duga serliga væl húsast fíggjarliga. Ein vissiliga tiltrongdur eginleiki!

**Systkini á Lava vóru:**
Peter Lave Olsen, nevndur Per Lava, var føddur 28/6 og doyptur í Havnar kirkju 3/7 1825.

Hann giftist við Sissal Abrahamsen, fødd 1815. Per starvaðist sum kvartermeistari á skansanum.

Annars var Per Lava útróðrar- og traðarmaður her í Havn. Peter Lava Olsen doyði 91 ára gamal tann 6/2 1917.

## Eftirkomarar

Per og Sissal áttu dótrina Susanne Katrine Olsen, fødd 20/11 1853. Hon giftist 28/11 1878 við Óla Fredrik Hansen ella Óla á Velbastað, føddur 8/7 1853. Tey búðu inni í Koytustovu hjá Per Lava og fingu tríggjar døtur og ein son.



*Koytustova úti á Reyni, har Per á Lava búði*



*Høvdasund, har tveir av beiggjunum hjá Petur á Lava sjólótust 1/7-1858*

**Børnini vóru:**
- Cecilie Pauline Sophie Hansen, fødd 8/2 1880.
- Anna Jensine Hansen, fødd 29/4 1882
- Petra Fredrikka Hansen, fødd 3/10 1884
- Hans Olaf Hansen, føddur 9/2 1891. Hann var nevndur Hans hjá Per Lava, helst tí, at hann vaks upp hjá abbanum.

Hans Olaf giftist við Magninu Sofie Fredrikke Weihe, fødd 17/12 1896 í Porkeri.

Hans hjá Per Lava var útbúgvin skipstimbrari og starvaðist á Tórshavnar Skipasmiðju.

Tey búðu úti á Landavegnum, har samkoman Filadelfia í dag heldur til. Har høvdu tey trøð, fjós og kúgv á bási.

## Systkini hjá Per

**Thomas Pauli Olsen**, føddur 17/1-1828. Hann gekk burtur 30 ára gamal í Høvdasundi tann 1/7 1858. Hann átti ein son við Onnu Joensdatter, fødd 22/9 1829, á Hvítanesi. Tey vóru vist ikki gift.

Sonurin var Fredrik Thomsen, sum vaks upp niðri á Lava saman við systkinabørnunum Óla, Johan, Hans Paula, Andreas og Jens. Hann fór sum ungur til South Allovay í Skotlandi, har familja hansara enn finst undir navninum Thomson.

**Malena Olesdatter**, fødd 22/9 1830. Hon giftist við Jóannesi, sum fekk sær navnið Tauser. Hon átti sonin Óla Tauser, (4/8 1863-13/6 1930) við Joen Peter Nicolaisen, áðrenn hon giftist við Jóannesi. Óli Tauser var giftur við Johonnu fødd 11/1-1880 í Hovi, deyð 20/12-1928.

Versonur teirra, Jóhannes Tauser, gjørdist elsta manligi føroyingur, 105 ára gamal.

**Augustinus Olsen** var føddur 27/7 og doyptur 11/8 1833 í Havnar kirkju. Agga fór sum ungur til Kirkjubøar at vera húskallur. Seinni var hann eisini nøkur ár úti í Dímun. Hann bar orð fyri at vera av bestu svimjarum og av bestu bjargamonnum. Sagt varð um hann, at hann kundi skjóta skarv og sjálvur - sum ein veiðihundur - leypa á bláman eftir honum. Í Trøllhøvda er »Aggarók« uppkallað eftir honum. Har skal vera stórt loft, og er Agga fyrsti maður, ið tikið hevur hesa rókina.

Agga á Lava giftist í 1860 við Onnu Thomasdatter, fødd 10/12 1832 í Skúvoy. Tey flyta inn til bróður hennara Mikkjal Thomassen á Dunganum. Men tá hesin giftist árið eftir í 1861, flyta tey inn í eini lítil hús uppi við Lið, sum Agga helst sjálvur hevur bygt.

Við fólkateljingina í 1870 standa Augustinus Olsen, 37 ár, Anna Thomassen, 37 ár, og børnini Óli Gudmund Olsen, 9 ár, Sunneva Maria Olsen, 3 ár, at búgva uppi við Lið. Við fólkateljingina í 1880 stendur Anna Thomassen 48 ár, at vera einkja. Við fólkateljingina í 1890 stendur Anna Tausen Olsen 59 ár og Johanna Thomina Margreta Olsen, 18 ár, at búgva uppi við Lið.

Anna stendur fyri at vera einkja, men Agga er á lívi. Hann fór burtur í heim og varð horvin í nógv ár. Tí hann verið hildin at vera deyður. Men um aldarskiftið kemur hann aftur, og hann doyr nøkur ár seinni. Petur Alberg skrivar um hann í síni dagbók.

**Anna Elisabeth Olesdatter**, fødd 31/10-1836, varð nevnd Kiskulingurin á Lava helst av teirri orsøk, at hon hevur verið nakað ómøgulig. Hon átti eina dóttur, hóast hon ikki var gift, nevnd Olevina Olsen, fødd 23/12-1870. Pápin var Peter Chr. Olsen úr Havn. Olevina bar orð fyri at vera sera vøkur. Hon vaks upp í heiminum hjá Pedda Weis, sum var næsta húsið niðaneftir hjá teimum á Lava. Sum tilkomin flutti Olevina saman við móðir síni til Svendborg í Danmark at búgva, har hon giftist við einum skipara.

Jákup á Lava, sum eitt tíðarskeið sigldi við skonnartini »Sjey Systrar« hjá Valdemar Lützen, var einaferð, meðan hann sigldi við hesum skipinum, og vitjaði tær báðar.



*PETER Á LAVA OLSEN'S FAMILIUGRAVSTAÐ*



*Peter Lava Olsen, nevndur Per Lava*

**Ole Olsen Tauser** var føddur 6/4 1840, men doyði hann bert 19 dagar gamal tann 25/4 1840, men vit kenna ikki orsøkina til, at hann doyði so lítil.

**Óla Hans Olsen** var føddur tann 21/3 og doyptur í Havnar kirkju ¾ 1842, har hann varð konfirmeraður 28/6 1857. Hann gekk burtur í Høvdasundi 1/7 1858 saman við bróðrinum Thomas Paula og tveimum øðrum monnum.

Kirkjubókin sigur frá, at 1/7 1858 gingu burtur "Thomas Pauli Olsen, ungkarl, søn af Ole Lava Pedersen i Thorshavn, 30 år, Ole Hans Tausen, førstnævntes broder af Thorshavn, 16 år, Joen Pauli Simonsen, ungkarl, søn af Simon Johannesen af Thorshavn, 23 år, og Samuel Peder Joensen, søn af afdøde jæger Joen Pedersen, ungkarl, af Thorshavn, 18 år.

**Jacob Tauser Olsen**, føddur 3.8 1845, giftist við Elsebeth Hansen f. 28.8 1846 ættað úr Funningsstovu í Havn. Tey bæði hava fyrr verið umrødd í hesi røð. Tað er langabbasonur teirra Johan Restorff Jacobsen, sum er kelda til greinirnar vit hava havt um Lavaættina og eisini til aðrar greinir í hesi røð.

**Komandi partur**
Í komandi viku umrøða vit Onnu og Sam Olsen